# TILTØK

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419. Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18. Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur:
lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696,
ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919,
hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210,
gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832,
trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883,
kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 322686. Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa
mentunargrein í Føroyum. Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**ÚF**
**Morgunlestrar**
**10.–15. november**

***Torkil Haraldsen í Sørvági lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 10. november:**
nr. 330 Yndislig, føgur
nr. 520 Sólin hevur sama lag

**Týsdagin 11. november:**
nr. 515 Guðs náði altíð er mær hjá

**Mikudagin 12. november:**
nr. 541 Nú hvítna tindar fjøllum á

**Hósdagin 13. november:**
nr. 540 Almikið árið líður
nr. 53 Ongum er so trygt at fara

**Fríggjadagin 14. november:**
nr. 474 Guð Harrin leit av himni hátt

**Leygardagin 15. november:**
nr. 552 Sí, sólin fríð
nr. 48 Lítla Guðs barn, hvat sakar teg




**Vika 45 – 5. november**
Vinnaratøl: **02 - 17 - 27 - 32 - 36 - 39**

Eykatøl: **30 - 43**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | 3.573.373,- kr. |
| 5 vinnarat.+ eykatal | 102.117,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 3.770,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 119,- kr. |
| 3 vinnaratøl: | 38,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## GJALDOYRAKURSIR

*Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum*

| | | 06.11.03 | Ultimo okt. 2003 |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 649,4500 | 639,6300 |
| Bretland | **Pund** | 1088,6700 | 1083,1700 |
| Svøríki | **Króna** | 82,5900 | 82,1700 |
| Noreg | **Króna** | 90,2100 | 90,5300 |
| Sveits | **Frankur** | 474,7500 | 479,4100 |
| Ísland | **Króna** | 8,5200 | 8,3700 |
| Kanada | **Dollari** | 487,5500 | 485,6800 |
| Japan | **Yen** | 5,9060 | 5,8663 |
| | **Evra** | 743,5600 | 743,3800 |

FØROYA SPARIKASSI

# KROSSORÐ



**Vinnari:**

***Randi Túgvustein***
***Millum Gilja 44***
***188 Hoyvík***

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: ROKASLIGUR



### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

**354**

**Loysunarorðið:** ..................

Navn: ........................

Bústaður: ..................

Bygd/býur: ..................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***



# Finalistarnir skulu finnast

**Í triðja og síðsta undanumfarinum í singer/songwriter 2003 verða tveir finalistar funnir millum teir fimm ungu menninir, sum royna seg leygarkvøldið**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið verður tað triðja og síðsta umfarið av singer/songwriter 2003. Kappingin hevur higartil hilnast framúr væl. Bæði fyrireikarin Hotel Hafnia og luttakararnir lata ógvuliga væl at kappingini.

Àhugin fyri kappingini hevur eisini gjørt, at í hesum triðja og seinasta undanumfarinum verði ikki færri enn fimm luttakarar við, og harav fara tveir víðari til finaluna, sum verður hildin 22. november. Undan hesum umfarinum hava Ronnie Poulsen og Finnur Jensen vunnið sær pláss í finaluni.

**Ungir**
Teir seks, sum sleppa framat mikrofonini leygarkvøldið, eru allir ungir harrar. Ymiskt er, hvørjar royndirnar eru, men hugurin er so avgjørt tilstaðar.

Ein teirrra er Rói Johannesen úr Norðagøtu. Hann er í læru sum prentari á Estra, men fæst eisini við tónleik. Hann er 21 ára gamal og hevur spælt hampuliga fitt, men hevur ikki sungið nógv. Stílin hjá sær rópar hann fyri øðrvísi tónleik. Og so mugu fólk sjálvi lurta seg til, hvat tað er fyri nakað.

Ein annar luttakari leygarkvøldið verður Kristleif Zachariassen. Hansara stór fyrimynd er ein ógvuliga víðagitin singer/songwriter — nevniliga David Gray. Og tað er eisini á leið hesin stílur, sum Kristleif leggur seg eftir. Kristleif er 22 ára gamal og úr Kollafirði. Til dagligt starvast hann sum timburmaður í Kollafirði. Leygarkvøldið hevur hann trý nýggj løg í skjáttuni.

Tann yngsti av teimum ungu leygarkvøldið er Opor Thorleifson av Skála. Hann er átjan ára gamal, og hann hevur ikki hug at siga stórt meira um seg sjálvan, enn at hann spælir egin løg.




**Síðsti kjansur**
Meðan onkur av teimum, sum framføra leygarkvøldið, skulu koyra ein lítlan tíma ella so úr Eysturoynni, so hevur onkur luttakari heilt stutta leið.

Tað er serliga galdandi fyri Jóan Petur á Stongunum. 22 ára gamli havnarmaðurin er í læru á Hafnia sum kokkur, og hann vann fyri kortum eina kapping í Danmark innan sítt yrki. Íblásturin sigur hann seg fáa frá "melidiøsum" tónleiki. Tónlistarliga uppvøksturin hevur hann fingið í musikskúlanum í Havn, men hann hevur ikki spælt so nógv alment einsamallur.

Síðsti luttakarin er eisini úr Havn. Høgni Reistrup er navnið, og hann má teljast sum tann av luttakarunum við flest royndum. Hann er millum annað sangari í bólkinum Lawetz, og hann spælir somuleiðis við Føroya symfoniorkestri. Ìblásturin stavar frá fyrimyndini Dave Matthews og frá íslendsku Bjørk.

Ætlanin er ikki at hava fleiri undanumfør áðrenn finaluna. Hetta verður tískil síðsti kjansur hjá fólki at uppliva kappingini og tann heilt serstaka stemningin áðrenn finaluna.

Select
**Leiðari til Shell-støðina í Gøtudali!**

Søkt verður eftir støðleiðara til Shell-støðina í Gøtudali, at byrja skjótast tilber.

***Starvið:***
Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi starv, sum dagligur leiðari á Shell-støðini. Støðin er ein sonevnd **Select-støð**. Hetta eru sera nýmótans støðir, ið leggja dent á at veita kundunum bestu tænastu og eitt serliga stórt vøruúrval, m.a. nýbakað breyð, pylsur, tips & lotto umframt allar bilvørur, sjálvandi.

***Eginleikar:***
Vit ímynda okkum at umsøkjarin

- hevur góð leiðsluevni
- er ein góður seljari
- er íðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar

***Løn:***
Vit bjóða eina løn við eftirlønarskipan, ið verður ásett í samsvari við útbúgving og royndir.

***Umsóknir:***
Áhugað kunnu senda umsókn við neyðugum skjølum og merkt "Støðleiðari" til P/F Føroya Shell, Viðarnes, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 28. november 2003. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara á telefon 347400.

Team 85 • 358000

www.shell.fo

**Starvsffólk**
til bakaran í SMS

Til bakaran í SMS søkja vit eftir kassafólki at arbeiða skiftandi tíðir at byrja skjótast tilber.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Miklagarð á tel 31 30 11 og spyr eftir Johnny Priess.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11

**Reingerðarfólk**
til slaktaran í SMS

Slaktarin í Miklagarði í SMS sóknast eftir reingerðarfólki at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til 2 tímar um dagin eftir at stongt er frá mánadag til leygardag - aðru hvørja viku.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til slaktaran í Miklagarði, Jørgen Jørgensen á tel 217404.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11